Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Útbjóðing í sambandi við Fámjinstunnilin

Spurningar:

Ætlar landsstýrismaðurin at skipa soleiðis fyri, at útbjóðingin at gera tunnil og veg í sambandi við Fámjinstunnilin verður boðin út í tveimum, tvs. tunnil og vegagerð hvør sær?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin hevur áður nevnt, at ætlanin var at útbjóða arbeiðið at gera tunnil til Fámjins í tveimum – vegagerð og tunnil hvør sær – við tí endamáli, at smærri og lokalar fyritøkur kunnu sleppa framat at gera vegarbeiðið.

Nú lýst verður eftir fyritøkum til undangóðkenning sæst, at arbeiðið verður boðið út í einum, og tískil er ikki møguligt hjá smærri fyritøkum at bjóða seg fram.

Í útbjóðingartilfarinum hjá Landsverki verður sagt, at talan er um á leið 2.600 metrar av vegi. Harafturat verður sagt, at ætlanin er at byrja arbeiðið seint í 2021, og sostatt er ríkiligt av tíð at skipa soleiðis fyri, at smærri fyritøkur kunnu bjóða seg fram til vegarbeiðið. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 3. mai 2021

Henrik Old